Eik

# Nýtekning av partapeningi í Eik Banka P/F



Sambært § 34, stk. 2 í partafelagslógini verður við hesum boðað frá, at nevndin í Eik Banka P/F á nevndarfundi 11. juni 2007 við heimild í § 3, stk. 1 í viðtøkum felagsins hevur gjørt av við nýtekning at hækka partapening felagsins við í minsta lagi nom. DKK 78.260.900 og í mesta lagi nom. DKK 101.616.000. Felagið hevur tryggjað sær, at teknaðar verða í minsta lagi minsta upphæddin nom. DKK 78.260.900. Tí er eitt og hvørt innkomið tilboð um tekning av partapeningi bindandi.

Nýggju partabrøvini verða boðin út við fortekningarrætti til verandi partaeigarar í Eik. Teir fáa rætt at tekna partabrøv í lutfallinum 1 til 7. Tað merkir, at partaeigarar kunnu tekna 1 partabræv á nominelt DKK 100 fyri hvørji 7 partabrøv á DKK 100, ið teir eiga, tá kapitalhækkingin byrjar. Um so er, at verandi partaeigarar ikki brúka fortekningarrætt sín til fulnar, fáa nýggir íleggjarar og partaeigarar, ið ynskja at seta seg fyri fleiri partabrøvum, møguleika at seta fram bindandi boð uppá nýggj ella fleiri partabrøv.
Kursurin á nýggju partabrøvunum verður DKK 575 pr. partabræv. Hvørt partabræv hevur áljóðandi virði á DKK 100.

Tekningartíðarskeiðið og tíðarskeiðið, tá fortekningarrætturin kann verða nýttur, er 14 dagar. Nær hetta tíðarskeiðið verður, verður lýst seinni og í seinasta lagi saman við almannakunngerð av prospektinum.

Verandi og møguligir partaeigarar verða biðinir um at lesa og seta seg neyvt inn í tað, sum stendur skrivað í prospektinum.

Tórshavn, 18. juni 2007

# Kundi tú hugsað tær Betri pensjón?




Nú kanst tú fáa eina betri pensjón. Við bíligum tryggingum og størri samansparing, fært tú samstundis størri innlit og ávirkan á, hvussu tín samansparing verður ein íløga. Tað er einfalt og lætt at stovna tína eftirlønarskipan hjá Betri pensjón.

## Fakfeløg

Fult gjøgnumskygni ger tað lætt hjá tínum fakfelagslimum at síggja, hvussu nógv teir spara saman, og hvat teir gjalda fyri tryggingar og umsiting.

## Vinnulív

Hjá okkum fær fyritøkan eina skipan, sum krevur lítla umsiting, og sum tekur hædd fyri ymisku ynskjunum hjá starvsfólkunum.

## Einstaklingar

Valmøguleikarnir eru nógvir. Vit skraddaraseyma eina avtalu til tín. Á heimasíðu okkara sært tú, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, rindar fyri einstøku tryggingarnar, og hvussu nógv goldið verður fyri umsiting.

Umhugsar tú, so hugsa um okkum.

Betri pensjón